# Anfinn byggir ongan flogvøll

JOHN JOHANNESSEN
Løgtingsmaður



**Í fjølmiðlum sunnudagin tekur Anfinn Kallsberg sær æruna av ætlaðu útbyggingini av flogvøllinum í Vágum. Veruleikin er, at Jóannes Eidesgaard hevur loyst hetta mál, eftir at tað *ikki* eydnaðist Anfinni Kallsberg at finna loysn á málinum.**

So var Fólkaflokkurin aftur á bananum við einari rangsnúgving av veruleikanum. Eftirhondini sær tað út til, at rangsnúgvingarnar eru vorðnar ein vani. Ella kanska er tað herviligur valfepur, ið herjar ávísar fólkafloksmenn nú um dagarnar...

Hesaferð tekur Anfinn Kallsberg sær æruna av, at uppskot verður lagt fyri danska fólkatingið um at útbyggja flogvøllin í Vágum. Í tíðindaskrivi verður boðað frá, at *"eftir áheitan frá Anfinni Kallsberg, fólkatingsmanni, verður uppskotið um útbygging av flogvøllinum í Vágum nú lagt fram á danska fólkatinginum"*.

Tey sum kenna eitt sindur til málið vita, at Anfinn Kallsberg í síni løgmanstíð tosaði nógv um at fáa flogvøllin útbygdan og síðani yvirtiknan. Men tey vita eisini, at úrslit spurdust ongi burtur úr teimum mongu proklamatiónunum. Í øllum førum ikki onnur úrslit enn nógvar forsíður í bløðunum. Í so máta ein søga, ið líkist nógv søguni um Gásadalstunnilin, sum Fólkaflokkurin við landsins skjaldarmerki aftan fyri seg hevur latið upp og hátíðarhildið rættiliga nógvar ferðir á ymiskar hættir. Altíð við fullum stuðli frá ókritiskum fjølmiðlum.

**Jóannes fekk semju**

Í valstríðnum – ikki hesum nýggja hjá Fólkaflokkinum, men til seinasta løgtingsval – lovaði Javnaðarflokkurin at fáa loyst málið um útbyggingina og yvirtøkuna av Vága Floghavn. Hetta lyftið stóðu vit fast við, tá vit 31. januar 2004 skipaðu samgongu og yvirtóku løgmansembætið.

4. apríl 2005 var liðugt at samráðast. Formaður Javnaðarfloksins hevði nú røkt løgmansembætið í eitt stórt ár, og hendan 4. apríl fór hann við morgunflogfarinum til Keypmannahavnar at skriva undir felags yvirlýsing saman við danska forsætisráðharran um yvirtøku og útbygging av Vága Floghavn, umframt onnur týðandi stórmál.

Í felags yvirlýsingini siga Anders Fogh Rasmussen og Jóannes Eidesgaard seg vera samdar um, *"at søge driften og ejerskab af de danskejede dele af Vágar Lufthavn overført til de færøske myndigheder. Samtidig hermed tilvejebringes den nødvendige kapital til opdatering af lufthavnen ved, at egenkapitalen i Investeringsfonden for Færøerne nedkapitaliseres med tilsvarende beløb"*.

Á ríkisfundi 27. juni 2006 verður avtalan endaliga staðfest og undirritað í formligari semju ímillum danska forsætisráðharran, Anders Fogh Rasmussen, og Føroya løgmann, Jóannes Eidesgaard.

**Skuldi henda nú**

Tíðindavirðið í propagandaskrivinum frá Anfinni Kallsberg er, at danska lógaruppskotið, sum verður grundarlag undir yvirtøkuni og útbyggingini, nú verður lagt fyri Fólkatingið. Men at hetta hendir eftir harraboðum frá Anfinni Kallsberg er rangsnúgving av grovasta slag.

Boðini úr Danmark hava leingi verið, at danska stjórnin fór at leggja málið fyri Fólkatingið í byrjanini av 2007. Tí er tað púra rætt, sum Høgni Hoydal sigur á Portalinum sunnukvøldið, at danir hava boðað frá, at málið fór at verða lagt fram antin í desember 2006 ella í byrjanini av 2007.

Fullur sannleiki er tað eisini, tá Høgni Hoydal í somu tíðindagrein á Portalinum ger vart við, at Anfinn Kallsberg pyntar seg við læntum fjaðrum og at hann onki hevur við málið at gera.

Hetta var enn eitt dømi um eitt mál, har føroyska pressan uppfatar Anfinn Kallsberg sum tað fullkomna oraklið og letur seg brúka í einum ósmædnum valtaktiskum spæli hjá Fólkaflokkinum. Men pressan er ikki einsamøll. Í onkrum politiskum flokki, sum eg kenni rættiliga væl, er Anfinn Kallsberg eisini tað fullkomna oraklið. Tí hoyra vit so fá mótmæli ímóti rangsnúgvingunum...

# Finnur Helmsdal, nú er ovboðið!

SÓLFRÍÐ HEINESEN

Í Sosialinum 28. desember skrivar Finnur Helmsdal ein kritikk av viðmerkingum stjórnmálafrøðingurin Rúni Rasmussen hevði í Dimmu 27. desember um fólkaatkvøðu um sokallaðu glíðibreytina ella um 266b. Tú sigur, at skrivarin hjá stjórnarskipanarnevndini mælir til, at Føroya fólk skal til fólkaatkvøðu um at tað skal vera loyvt at niðurgera samkynd alment. Hetta er ein reingjan av veruleikanum, sum hevur eyðkent teg í øllum hesum málinum og á hendan hátt hevur tú villleitt ein stóran part av Føroya fólki. Tú setur spurningin um ein slíkur maður kann starvast sum skrivari hjá stjórnarskipanarnevndini. Slíka vanvirðing skal ein leita leingi eftir, er hetta ikki happing á hægsta stigi av einum, sum ikki hevur somu meining sum tú? Minst til, at tú ert ikki hvørt sum helst, men ein løgtingslimur, sum sigur seg umboða minnilutaverju og tolsemi.

# Millum jóla- og nýggjárs 2006

ÍVAR IVERSEN

Tað má bera til eisini at heilsa teimum, sum eru á lívi, við fagnaði! Hví bara skriva minningarorð um tey, ið farin eru av verðini? Tey síggja tað ikki. Hví ikki bera teimum núlivandi eina væluppiborna tøkk, sum tey sjálv kunnu meta um, og geva teimum eitt herðaklapp, ið hava evnað nakað sera virðismikið í okkara samfelag, eitt nú innan tónlist. Tað kann stimbra tey, og kanska geva teimum ein íblástur.

Nú á jólum var so vakurt og yndisligt at hoyra ungar tónleikanæmingar í Musikkskúla Føroya spæla í sjónvarpinum – eitt nú jólakonsertina hjá italska barokktónaskaldinum, Corelli. Vinmaðurin, slóðbrótarin og javnaldurin, Ólavur Hátún, eigur sín stóra lut í heiðurinum, sum fyri mær var ein so stór uppliving. Eitt ótrúligt avrik við tógvið stríð, hann hevur megnað at útinna.

Kanska nevnt áður so fór hann - Ólavur - ikki uppum, har garðurin var lægstur, men legði á, har eina ringast var at klíva upp - nevniliga at fáa landsins myndugleikar, ið ikki vanliga stuðla stórvegis uppundir mentanartiltøk, at taka undir við stremban hansara, at fáa ein veruligan musikkskúla settan á stovn. Tað hevur so eydnast honum.

At fylgja honum eftir megnaði eg ikki; kortiliga eygleiddi eg hann við vælvild í klintran síni upp ígjøgnum teir brøttu og illgongdu stíggjar, til eg at enda helt hann vera komnan upp á slætt – nær tað so einaferð eftir hansara tykki verður. Brátt 76 ára gamal sæst ikki hóllur á honum. Hann er altíð til dystin fús, og orkan sýnist at vera óavmarkað. – Tað higartil seinasta stóra avrik hansara var at framføra Messias av G. F. Handel – eitt av teim størstu verkum, ið skrivað eru í tónlistasøguni.

Føroya Symfoniorkestur var ikki fyri so mongum árum síðan hildið at vera nakað fullkomiliga óhugsandi – eins og undirsjóvar tunnlar. Í dag eru bæði veruleiki. Við áræði, dirvi og orku tykist nærum alt at bera til.

Tøkk fái tit, ið so væl hava dugað at stíla fyri. Gleðiligt nýggjár.

